# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Fagri nýggi krimiheimur

Jón Hallur Stefánsson, *Krosstre*, (Kvinden der forsvandt), Gyldendal, 2008

Valdimar og Marteinn eru tað nærmasta vit koma onkrum slagi av høvuðspersónum í nýggju íslendsku krimisøguni, *Krosstre* – sum heldur hugflogsleyst hevur fingið heitið *Kvinden, der forsvandt* á donskum.

Valdimar er kriminalpolitistur og Marteinn er sonur Bjørn, ið verður funnin illa viðfarin uttanfyri eini summarhús. Seinast, nakar sá Bjørn, var tá hann algoystur leyp avstað eina náttina, eftir at hava tikið ímóti einum telefonboðum.

Marteinn er fyrst í tjúgunum og hevur frammanundan ríkiligt av trupulleikum av pápanum, sum hevur eina elskarinnu á aldur við Marteinn. Elskarinna eitur Sunneva, og tað er hon, sum hvørvur. Sum lesarar vita vit alt ov væl, hvar hon er. Tað er ikki har, spenningurin liggur. Intensa dramaið stavar frá mátanum, høvundurin Jón Hallur Stefánsson letur lesaran fylgja konu Bjørn, foreldrunum hjá Sunnevu, og Hallgrímur, vinmanninum hjá Martin. Øll hava tey onkur loyndarmál, sum avdúka, at Bjørn ikki hevur so fá lík í skápinum.

*Krosstre* er ikki bara enn eini krimi, men ein, ið tvíheldur um, at krimisøgur eiga at teljast millum fagurfrøðiligar bókmentir. Og tað kann hon nokk eisini – serliga tá hon móti endanum prógvar, at reglurnar fyri eina krimi als ikki nýtast at vera til staðar fyri at gera eina krimi spennandi …




*Fyrsta bókin hjá íslendska krimihøvundanum, Jón Hallur Stefánsson, hevur fingið óvanliga góð ummæli*

# Heimastýri – ein tipt vesikumma

**"Eitt vesi við tiptari kummu. Hvørt rør, hvørt op, hvørt hol. Tipt. Steintipt"**
**Soleiðis sær heimastýris(ó)mentanin út í eygunum á rithøvundanum Carl Jóhan Jensen í nýggja ritlinginum, *Apuvit og Heimastýri***

RITLINGUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Stutt fyri jól gav høvundurin, Carl Jóhan Jensen, út ritlingin *Apuvit og Heimastýri.* Um sama mundi fylti høvundurin fimti ár. Ásannandi, at hann og Heimastýrislógin eru um sama aldur, hevði høvundurin sett sær fyri, hátíðarhalda hendingarnar við einum ritlingi á fimti síður.



*Rithøvundurin Carl Jóhan Jensen hátíðarhelt sín fimti ára føðingardag við eini uppgerð við javnaldran, føroyska heimastýrið, í ritlinginum "Apuvit og Heimastýri"*
*Mynd: Jens K. Vang*

### Politiskt onki

Tær fimti síðurnar í *Apuvit og heimastýri* umfata eina fagurfrøðiliga hugleiðing um list, nevnd "Tíð og tiptar listir", eina flaggdagsrøðu í Vágunum men fyrst og rúgvumiklast nakrar heldur speirekandi eygleiðingar av, hvat tað vil siga, at vaksa upp og royna at búnast undir Heimastýristilstandinum.

Íblásturin til at skriva hesar eygleiðingar í ritroyndarstíli við heitinum *Apuvit og heimastýri,* hevur høvundurin fingið frá nøkrum politiskum greinum, ið Jørgen Frantz Jacobsen skrivaði fyrst í tjúgunum um sína egnu tíð.

- Greinarnar hjá Jørgen Frantz eru fyri tað fyrsta rættiliga góðar. Eisini haldi eg, at hansara máti at greina samfelagið sæð í ljósinum av hendingum í hansara egna lívskeiði, er sera viðkomandi. Eg havi so gjørt nakað í sama stíl, sæð í ljósinum av heimastýrinum, sigur Carl Jóhan og minnir á, at hesar hugleiðingar ikki skulu lesast sum ein frøðiligur tekstur.

Sambært Carl Jóhan er Heimastýri eitt slag av tilstandi, ið verður stýrdur av eini fatan av (heimastýris) heiminum, ið høvundurin kallar Apuvit. Hendan fatan ella hugburður kemur til sjóndar í einum logikki, ið breiðir yvir alt, sum onkursvegna er tvørligt ella hugstoytt, eftir teirri meginreglu, at alt er, sum tað alment verður sagt at vera (á prenti ella á donskum), antin tað er so ella ikki. Við síðuna av hesi fatan rekst eitt serbrigdi av Heimastýrishugsan, sum eitur "Læran um politiskt onki". Hon kundi eins væl itið "Læran um politiskt hvørki". Í báðum førum er hon úrslit av einum politikki, sum bæði vil alt møguligt, men samstundis onki vil – also vil hann hvørki ella onki.

### Málið sum lagna

Men hvussu kennist tað so fyri ein rithøvund at liva í hesum innantóma heimastýristilstandinum?

- Eg kann ikki svara fyri onnur, men sjálvur havi eg í vaksandi mun kent heimastýrið sum eina andliga og mentanarliga forðing. Í øllum førum síðani eg bleiv mentanarliga ella listarliga tilvitaður. Eg kenni meg stutt sagt avmarkaðan og havi støðugt eina trongd at spreingja hetta heimastýrishylkið av mær.

Spurdur, hví hann so ikki bara sleppur sær av landinum, sigur Carl Jóhan, at tað hevði lítið nyttað.

- Føroyska málið er mín treyt fyri at virka sum høvundur. Tískil er málið eisini mín lagna, um tú vilt. Jú, eg kundi sjálvandi fari, men eg hevði í veruleikanum ongantíð sloppið burtur. Tú kanst ikki flýggja undan lagnuni …

Í ritroyndini "Tíð og tiptar listir" kemur høvundurin eitt sindur nærri at, hvat tað er, sum ger tað so avmarkandi at fáast við list í Føroyum.

Fyrst og fremst er tað ein hugburður, sum altíð vil umbera. Ikki illkennast. Ikki róta upp. Skjótt sagt ein hugburður, ið vil eina list í andligum frígiri. Í føroyskari list er samtíðin annaðhvørt illa kend ella gjørd leys við teir partar av henni, ið kunnu ella kunnu ætlast at ørkymla breiðsemjuna – tað allarheilagsta í føroyskum hugsanarlívi.

Hóast glottar eru at hóma, sambært Carl Jóhan, má afturlatna heimastýrið opa seg mentanarliga, áðrenn nakað munagott kann henda á listarliga økinum. Eitt upptak má til. Ein úrtipping, so skolað kann verða ígjøgnum heimastýrisvesið.

## Frá bóndasoni til sjúkrasystir

Axel Johannesen, *Fra kongsbondesøn til sygeplejerske*, Queenswood, 2007

Axel Johannesen, kongsbóndasonur úr Vestmanna, var fyrsta, føroyska manfólk, ið tók útbúgving sum sjúkrasystir.

Í endurminningunum, *Fra kongsbondesøn til sygeplejerske,* greiðir hann frá, hvussu hann sum ungur droymdi um at gerast sjómaður, eins og pápin og beiggjarnir. Hetta dámdi mammu hansara tó so illa, at Axel í staðin valdi at fara til Danmarkar at læra til diakon og seinni til sjúkrasystur.

Í bókini lítur 82 ára gamli Axel aftur á eitt langt lív, har hann største partin av tíðini hevur arbeitt við teimum eldru, sjúku og brekaðu, m.a í 23 ár sum varaleiðari á einum røktarheimi á Sælandi. Hesin parturin av bókini gevur eina mynd av einum emnniskja, sum av fullum huga hevur vígt sítt lív til tey veikastu.

Men minnini um Føroyar eru ongantíð langt burturi. Serliga í fyrra partinum av bókini gevur høvundurin eina óvanliga livandi mynd av lívinum á bygd fram til endan av seinna veraldarbardaga.

Hóast Axel Johannesen ongantíð er fluttur heim aftur til Føroyar, rennur sambandið við tað føroyska sum ein reyður tráður gjøgnum hansara lív og bókina. Gjøgnum hansara virkna leiklut í fleiri føroyingafeløgum, fær lesarin eitt neyvt innlit í lívið millum føroyngar í Danmark.




*Axel Johannesen úr Vestmanna hevur eina forkunnuga søgu at siga um lívið sum sjúkrasystir millum tey veikastu í samfelagnum*